

## Tveir Juventus-spælarar til Madrid

Juventus varð fyri støttum dømt at flyta niður í Seriu B, og tá venjarin hjá italska meistaraliðnum tey bæði seinnu árini, Fabio Capello, samstundis er farin til Real Madrid, ganga handlarnir skjótt fyri seg.

Soleiðis hav aFabio Cannavaro og Emerson nú skrivað undir tvey-ára sáttmála við spanska stórfelagið. Sambært sponskum miðlum er samlaði prísurin fyri teir báðar spælararnar 150 mió kr.

**-mørk**

## ÍF venjarin uppsagdur

Fyrrapartin í dag boðaði ÍF frá, at Petur Simonsen er sagdur úr starvi sum venjari hjá felagnum.

Eftir at hava verið undir einum ávísum trýsti seinastu tíðina vegna støðuna á stigatalvuni í Formuladeildini, var fundur um málið í gjár. Aðalnevnd, fótbóltsnevd og ÍF-stuðlar vóru á fundinum. Niðurstøðan var, at undir verandi umstøðum er skilabest at siga samstarvið við Petur Simonsen upp. Hóast samstarvið við Petur hesa tíðina hevur verið gott, so varð mett at hetta var neyðugt, verður sagt í tíðindaskrivinum

Nýggjur venjari er Jón Simonsen, sum hevur verið hjálparvenjari hetta síðsta hálvárið. Hjálparvenjari hjá honum verður Símun Eliasen.

# B36 vil hava heimadyst fyrst

**Mikukvøldið tordi Kristjan á Neystabø at viðganga, at teir longu hava gjørt alt fyrireikingararbeiðið klárt til turkisku innrásina, sum nú er í væntu. Og sum skilst, kann innrásin væl verða framskundað eina viku**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast vit her í blaðnum hava skrivað, at tað kundi skapa trupulleikar, um Føroyar skuldi hýsa stóra turkiska ferðalagnum, sum er í væntu, nú B36 skal spæla móti Fenerbache, so er hetta ein uppgáva, sum er loyst.

– Eftir dystin á Malta, sum jú gav okkum eitt framúr útgangsstøði, hava vit saman við Fenerbache arbeitt við eini loysn. Og tað er heilt víst, at tað væl og virðiliga ber til at hýsa stóra ferðalagnum, sum nú kemur hendanvegin.

– Vit hava í góðari tíð verið í samband við FSF, sum hevur bílagt flestu hotel-kømurini um hetta mundið. Og rættiliga tíðliga tryggjaðu vit okum, at tað bar til at hýsa øllum, skuldu vit vunnið okkum víðari. Men hetta er sjálvandi nakað, sum vit hava gingið sera stillisliga um. Fyrst og fremst, so máttu vit jú loysa uppgávuna móti Birkirkara, og tað megnaðu vit tíbetur, sigur Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn, sum tekur sær av viðurskiftunum kring Formula-liðið hjá árstalsfelagnum.

### Gongur við gestablídni

Hann sigur annars, at teir hava fund við leiðsluna hjá Fenerbache hósdagin, og tá hesin er fundur er av, áttu øll viðurskifti viðvíkjandi ferðing og gisting at verið avgreidd. Eisini hjá teimum mongu tíðindafólkunum, sum eru í væntu. Hesi kunnu ikki øll vera vís í hotel-uppihaldi, men sum Kristjan tekur til, so er føroyski blíðskapurin vanliga stórur, so tað man eisini fara at ganga, heldur hann.

– Og tað skerst ikki burtur, at vit eru ernir av, at vit fáa møguleika at hýsa einum slíkum liði. Og eri sannførdur um, at vit ikki fáa nakrar sum helst trupulleikar í so máta.

Og fáa tit so heldur ikki trupulleikar av dystinum sjálvum?

– Tað fái eg so ikki lova. Eg kann lova, at vit avgreiða alt annað eftir bókini, men sjálvan dystin fái eg illa svarað fyri!

### Vilja spæla heima fyrst

Lutakastið til dystin móti Fenerbache lagaði tað so, at B36 fyrst skal spæla á útivølli. Skuldi B36 framt enn eitt bragd í Turkalandi, og soleiðis fingið eitt gott útgangsstøði undan heimadystinum, er lítið at ivast í, at áskoðaratalið til hendan vildi verið sera høgt. Hinvegin lúrir vandin eisini fyri, at eitt skrædl á útivølli kann minka munandi um áhugan fyri heimadystinum, og tað er nakað, sum B36 tykist vilja sleppa undan.

Tað ljóðar í øllum førum, at B36 arbeiðir hart við at skifta um heima- og útidyst móti Fenerbache, soleiðis at dysturin á Tórsvølli verður longu 26. juni. Og hetta er so ikki nakað, ið verður avsannað av Kristjani á Neystabø.

– Eg fái sum so ikki gjørt viðmerkingar til, hvørji evnini verða á fundinum hósdagin. Men vit arbeiða við øllum møguleikum, er einasta viðmerkingin, sum Kristjan vil gera hesum viðvíkjandi.



*B36 er til reiðar at hýsa turkunum, sigur Kristjan á Neystabø. Spurningurin tykist nú bert vera, um felagið eisini megnar at sannføra Fenerbache um tað skilagóða í at skifta um heima- og útidyst*

*Mynd: Álvur*

## Vóru ikki bangnir

Spurdur, hvørt tað var ein stórur lætti, tá hann sendi bóltin í kassan til 2-1, helt Obi ikki, at hetta var so nógv øðrvísi enn onnur mál, sum hann hevur skotið.

– Sjálvandi var tað deiligt, og vit ætlaðu okkum at vinna, ella í minsta lagi at fáa javnleikin. Men fyrst og fremst ráddi um at koma víðari, og tað megnaðu vit tíbetur.

Kendu tit tykkum undir trýsti. ella vóru tit bangnir, tá teir fyrst javna, og tit síðani missa Mikkjal á miðvøllinum?

– Nei. Vit vistu alla tíðina, at vit komu víðari. Líkamikið, hvussu nógvar spælarar vit mugu vera fyriuttan, so standa vit altíð væl í verjupartinum, og tí var eg ongan tíð bangin, staðfesti nigerianski álopsspælarin hjá B36. Og nú verður tað so Fenerbache, sum stendur fyri framman. Hvussu sært tú ta uppgávuna?

– Tað er sjálvandi ein stór uppgáva. Men hvat. Teir eru ellivu og vit eru ellivu, so vit mugu bara royna at gera okkara besta. So fáa vit at síggja, hvussu langt tað røkkur, helt Obi.

**- mørk**



*Okeke Obele Onyebuchi staðfesti, at teir ongan tíð kendu seg hóttar í samlaða sigrinum*

*Mynd: álvur*

# Panikkur í eina løtu

Liðskiparin hjá B36 var sjálvsagt errin, tá hann og hansara menn mikukvøldið høvdu skrivað enn ein part av føroyskari fótbóltssøgu.

Sjálvur plagar Klæmint Matras ikki at teljast millum ídnastu málskjúttarnar, men hesa ferð var tað hann, sum legði B36 á odda eftir ein fyrra hálvleik, har B36 stýrdi tí allarmesta. Ein støða, sum tó als ikki var galdandi eftir steðgin, tá spenningurin helst var størri, enn fleiri í B36-leguni brýggjaðu seg um.

– Kanska gjørdust vit ov vísir í, at vit komu víðari. Í øllum førum spæla vit sum eitt heilt annað lið, tá vit koma út aftur á vøllin. Tað gevur teimum møguleika at koma aftur í dystin, og eftir at teir javna, er ikki heilt frítt, at panikkur kemur í hjá okkum.



*Fagnaðurin var stórur, tá Klæmint Matras beint fyri steðgin stútaði B36 á 1-0*

*Mynd: Álvur*

Var tað so ein stórur lætti, tá Obi skoraði til 2-1?

– Tað kanst tú ætla. Vit roknaðu nokk við, at vit skuldu koma víðari, men vit vildu fyri alt í verðini ikki tapa dystin. Tað var kanska eitt lítið vónbrot, at vit ikki megna at vinna, tá vit tvær ferðir eru á odda, men vit taptu ikki – og vit eru altso víðari í kappingini, slær Klæmint fast.

Og so torir hann loksins at viðganga, at nú er tíðin komin at hugsa um Fenerbache, Anelka, Zico og aðrar góðar menn.

– Sjálvandi roknaðu vit við, at hetta skuldi ganga. Men vit vildu altso hava hendan dystin av vegnum, áðrenn vit fóru at tosa um nakað annað.

– Nú kunnu vit so fara at fyrireika okkum til dystin í Turkalandi, og so mugu vit síggja, hvussu tað fer at ganga. Har mugu vit so spæla uttan Mikkjal, sum er leikbannaður, men vit fara so á vøllin at gera okkara besta. Og undan dystinum er alt í prinsippinum jú opið, heldur B36-liðskiparin.

**-mørk**